# Leys størv í Tórshavnar kommunu



**Pedagogur og stuðulfólk til Frítíðarskúlan í Hornabø**

Søkt eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna og einum stuðli at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber ella eftir nærri avtalu. Starvið sum stuðul er tíðaravmarkað frá 3. januar 2008 til 30. juni 2008.

Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum í Hornabø, Hornagøta 13, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. januar 2008.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Ann-Elisabeth Joensen, stovnsleiðara, telefon 21 44 67.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

Tórshavnar kommuna



Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Tveir pedagogar til Bústovnin Eirargarð 16A/BN

**Søkt verður eftir**
- pedagogi til fulltíðarstarv
- hjálparfólki fyribils 20 tímar um vikuna í tveir mánaðar til setan 01.02. 2008 ella eftir nærri avtalu.

Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk, har fleiri teirra hava likamlig brek.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjararnir eru likamliga væl fyri, eru áhugaðir í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og eru opnir fyri nýhugsan. Haraftrat er neyðugt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við onnur, umframt at vera førir fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

**Setanartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á Bústovninum á tlf. 315422 ella 315423.

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

**Bústovnurin á Eirargarði 16 A/BN**
100 Tórshavn
Stílað: Bjørg Mohr, leiðari

**Umsóknarfreist:** 18. januar 2008.

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



# Felags bønarvika

*"Sum í himli so á jørð" Mat. 6.10*

**í Filadelfia og Evangeliihúsinum**
**8. – 13. januar 2008**

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 08. januar: | Kl. 20 í Evangeliihúsinum |
| Mikukvøldið 09. januar: | Kl. 20 í Evangeliihúsinum |
| Hóskvøldið 10. januar: | Kl. 20 í Filadelfia |
| Fríggjakvøldið 11. januar: | Kl. 20 í Filadelfia |
| Leygardagin 12. januar: | Kl. 10 og 13 í Evangeliihúsinum |
| Sunnumorgunin 13. januar: | Kl. 10.45 felags møti í Filadelfia |

Lovsangur, undirvísing við Tummas Jacobsen og Dánial á Dul Jacobsen og bøn.

***Hvítusunnusamkomurnar:***

**Filadelfia**
Landavegur 22
www.filadelfia.fo

**Evangeliihúsið**
Tróndargøta 36
www.gospel.fo

